

Umráðandi at skapa arbeiði

Tíðindaskriv frá Samtak

Nú makrelfiskiskapurin tekur dik á seg er týdningarmikið, at tað verður arbeiðsskapandi fyri okkara sjófólk og arbeiðsfólk á landi.

Tað er týdningarmikið, at reiðaríini, sum fáa lut í fiskiskapinum, hava treytir við fiskiskapin. Føroyar hava fleiri virkir, sum kunna taka ímóti makrelinum, tískil skuldi verið lag á manni at fingið so nógv framleitt í Føroyum sum gjørligt.

Arbeiðsloysi er stórt, og hóast tað eru glottar at hóma, so er týdningarmikið, at okkara vinnupolitikkur eisini tekur atlit til at vera arbeiðsskapandi. Hetta er serstakliga galdandi í tilfeingisvinnuni.

Eisini er týdningarmikið, at sáttmálarnir hjá manningarfeløgunum vera hildnir, og at tað ikki eru sjófólk aðrastaðni, sum kunna arbeiða fyri undirlønir, sum fara avstað við størvunum á sjónum. Hetta er við til at gera ójavna kapping, hetta ger at føroyski sjómaðurin missur arbeiðið og hetta er sosial dumping. Hetta má steðgast umgangandi, um neyðugt við fakligum tiltøkum mótvegis teimum reiðaríum, sum ikki halda galdandi sáttmálar.


Makrelurin er týdningarmikil fyri búskapin, og sjálvsagt skal tilfeingi geva arbeiðið til sjófólk og arbeiðsfólk á landi – einki annað kann góðtakast.

Avlandsskattur



Nú kunnu føroyingar hótta seg til skattalætta

Í MORGIN




Fleyr til gul av landsynningi, um kvøldið upp í stívt andøvsgul av útsynningi. Turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.

SUNNUDAGIN



Fyrrapartin fleyr til gul av útsynningi, turt og sólglottar, men seinnapartin frískar hann vindin av útnyrðingi og kanska okkurrt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.

MÁNADAGIN




Fleyr til gul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 ogf 13 stig.

Veðrið týsdagin og mikudagin:
Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og kanska okkuret ælið, men annars turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.




Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

LUFTTRÝSTIÐ




Síðstu nátt:
Eitt hátrýst, 1038 hPa. yvir Suður-Noreg kemur handavegin.




Komandi nátt:
Hátrýstið yvir Norsk Havinum fer spakuliga í landnyrðing.

HITALAG



AVFALL



Miðal: 70 mm

VESTFALLSKYRRINDI

Kelda: Almanakkin 2012

19. mai Mánin longst frá jørðini
21. mai Tendring
28. mai Fyrra kvarter
3. juni Mánin næstur jørðini

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
25. mai	10:39	23:01	09:39	22:01	09:54	22:16	00:18	12:39	01:18	13:39	08:54	21:16	07:54	20:16	10:54	23:16	11:54	-	10:24	22:46	11:39	-
26. mai	11:21	23:42	10:21	22:42	10:36	22:57	01:01	13:21	02:01	14:21	09:36	21:57	08:36	20:57	11:36	23:57	00:16	12:36	11:06	23:27	00:01	12:21
27. mai	-	12:03	11:03	23:24	11:18	23:39	01:42	14:03	02:42	15:03	10:18	22:39	09:18	21:39	-	12:18	00:57	13:18	11:48	-	00:42	13:03
28. mai	00:24	12:58	11:58	-	-	12:13	02:24	14:58	03:24	15:58	11:13	23:48	10:13	22:48	00:39	13:13	01:39	14:13	00:09	12:43	01:24	13:58
29. mai	01:33	14:08	00:33	13:08	00:48	13:23	03:33	16:08	04:33	17:08	-	12:23	11:23	23:59	01:48	14:23	02:48	15:23	01:18	13:53	02:33	15:08